# Skatta- og avgjaldsmál avgerðir

| Mál nr.: 10/00101 | Lóg: Lóg um Toll- og Skattafyrisiting § 24 | Avgerð tikin: 02.09.2010 |
|---|---|---|

## Sýtt frávik frá kærufreist


**Samandráttur:**

**Kært er ov seint. Kærarin hevur upplýst, at kært er ov seint, tí hann ikki var klárur yvir, at Kommunala Skattakærunevndin og Skatta- og avgjaldskærunevndin eru tvær ymiskar nevndir. Hóast tað er óheppið, at nøvnini á kærunevndunum eru lík, og torført er at skilja ímillum nevndirnar, eru trupulleikar hesum viðvíkjandi ikki umstøður, sum kunnu geva grundarlag fyri at víkja frá freistini. Skatta- og avgjaldskærunevndin hevur avgjørt at nokta at gera frávik frá kærufreistini. Avgerðin verður grundað við, at grundgevingar kærarans fyri ov seinu kæruni tala ikki fyri, at fullgott forfall er.**


### Avgerð

**Kært er um,** at Kommunala Skattakærunevndin hevur staðfest avgerð hjá TAKS at uppkrevja eykagjald á 4% av írestandi skattinum fyri 2007 sambært § 78, stk. 2 í skattalógini.

Avgerðin hjá Kommunalu Skattakærunevndini er dagfest 10. august 2009. Kæran er dagfest 3. juli 2010 og var Kærustovninum í hendi 6. juli 2010. Hetta er aftaná, at kærufreistin er farin.

**Kærarin** hevur upplýst, at orsøkin til, at kært er ov seint er, at hann ikki var greiður yvir, at Kommunala Skattakærunevndin og Skatta- og avgjaldskærunevndin eru tvær ymiskar nevndir. Nøvnini hjá nevndunum eru ógvuliga lík, og torført er hjá fólki at kenna mun á teimum. Tá kærarin í kæruvegleiðingini frá Kommunalu Skattakærunevndini fekk upplýst, at hann kundi kæra til Skatta- og avgjaldskærunevndina, helt hann, at talan var um somu nevnd, og at tað tí ikki kundi nytta at kæra. Hann hevur síðani fingið upplýst frá aðrari síðu, at talan er um tvær ymiskar nevndir.

**Avgerð hjá Skatta- og avgjaldskærunevndini**
Sambært § 24, stk. 2, síðsta pkt. í lóg um toll- og skattafyrisiting, skal kæra vera send, áðrenn 4 vikur eru lidnar frá tí, at kærandi fekk boð um avgerðina. Heimild er tó til at gera frávik frá kærufreistini, um nevndin heldur fullgóð forføll vera, jbr. § 24, stk. 3.

Avgerðin hjá Kommunalu Skattakærunevndini er dagfest 10. august 2009 og má roknast at vera móttikin í seinasta lagi tann 13. august 2009. Fýra vikur frá hesum degi er tann 10. september 2009. Kæran skal verða send, áðrenn hesin dagur er liðin fyri at vera rættstundis.

Kæran er dagfest 3. juli 2010 og var Kærustovninum í hendi 6. juli 2010. Hetta er aftaná, at kærufreistin er farin. Útgangsstøðið er tí, at kæran verður ikki tikin til viðgerðar.

Sum nevnt kann frávik verða givið, um nevndin metir fullgóð forføll vera.

Kærarin hevur upplýst, at kært er ov seint, tí hann ikki var greiður yvir, at Kommunala Skattakærunevndin og Skatta- og avgjaldskærunevndin eru tvær ymiskar nevndir. Tá kærarin í kæruvegleiðingini frá Kommunalu Skattakærunevndini fekk upplýst, at hann kundi kæra til Skatta- og avgjaldskærunevndina, helt hann, at talan var um somu nevnd, og at tað tí ikki

kundi nytta at kæra. Hann hevur síðani fingið upplýst frá aðrari síðu, at talan er um tvær ymiskar nevndir.

Hóast tað er óheppið, at nøvnini á kærunevndunum eru lík, og torført er at skilja ímillum nevndirnar, eru trupulleikar hesum viðvíkjandi ikki umstøður, sum kunnu geva grundarlag fyri at víkja frá freistini.

**Skatta- og avgjaldskærunevndin hevur avgjørt at nokta at gera frávik frá kærufreistini. Avgerðin verður grundað við, at grundgevingar kærarans fyri ov seinu kæruni tala ikki fyri, at fullgott forfall er.**